UTTAN ÚR HEIMI



*Hóast stuðlarnir hjá Hamas ikki líkjast vanligum politiskum stuðlum, vænta eygleiðarar, at flokkurin verður ein annar aftan á valið mikudagin.*

# Hamas tykist sinnaður at viðurkenna Ísrael

**Tann víðgongdi Hamas-flokkurin er sinnaður at toyggja seg langt fyri at fáa politiska ávirkan aftan á palestinska valið mikudagin.**

PALESTINA

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Eru veljarakanningarnar upp undir palestinska tjóðartingsvalið eftirfarandi, fær tann vanliga so víðgongdi Hamas-flokkurin millum ein triðing og eina helvt av teimum 132 umboðunum.

Slagorðið hjá Hamas undir valstríðnum hevur verið ”Broyting og nýskipan”, og í valskrá floksins sæst, at Hamas er til reiðar at víkja frá sínari vanligu støðutakan. Eitt nú hevur flokkurin altíð havt sum mál at rudda ísraelska ríkið av kortinum, men í valskránni eru ábendingar um, at flokkurin er til reiðar at góðtaka eitt ísraelskt ríki við síðuna av einum palestinskum ríki, skrivar norski tíðindamaðurin Per A. Christiansen úr Ramallah á Vestara Áarbakka.

Eygleiðarar hava eisini víst á, at fyri bara fáum árum síðani var tað púra óhugsandi, at Hamas fór at stilla upp til eitt tjóðartingsval. Flokkurin vildi ikki vita av Oslo-sáttmálanum frá 1993, og tá vildu hvørki PLO ella Ísrael hava nakað við Hamas at gera. Men í dag er støðan ein onnur. Fyrrverandi ísraelski trygdarráðgevin Mali Steinberg sigur við blaðið Haaretz, at sambært valskránni hevur Hamas ásannað, at palestinar vilja hava frið við Ísrael, og palestinski tíðindamaðurin Jafar Sadaka sigur við blaðið Al-Ayyam, at vit fara ikki at kenna Hamas aftur aftan á valið.

Ísraelska stjórnin vil ikki vita av Hamas, men í seinastuni hava ábendingar verið um, at leiðandi ísraelskir politikarar eru ikki so stívrendir í hesum spurninginum longur. Alment er Hamas tó framvegis ein yvirgangsfelagsskapur, og tað er eisini uppfatanin í USA og ES. Men so seint sum seinasta fríggjadag segði Shimon Peres, at Ísrael kann fara til samráðingarborðið saman við Hamas, um felagsskapurin vendir sær frá yvirgangi og letur vápnini frá sær.

Sambært ísraelskum myndugleikunum hava atsóknir hjá Hamas kostað umleið 300 ísraelskum ríkisborgarum lívið, síðani felagsskapurin varð stovnaður í 1987.

# UNICEF í penganeyð

**Fær altjóða barnahjálpargrunnurin ikki meiri pengar, kann tað kosta nógvum børnum lívið.**

HJÁLP

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Altjóða barnahjálpargrunnurin hevur tørv á næstan fýra milliardum krónum til at hjálpa neyðstøddum børnum kring heimin. Í ársfrágreiðingini, sum stovnurin almannakunngjørdi í gjár, heitir UNICEF á lond og felagsskapir um at veita hjálp til tað, sum stovnurin kallar ”tær gloymdu vanlukkurnar”.

-Neyðhjálpin aftan á flóðalduna í Suðurasia og jarðskjálvtan í Pakistan fekk nógv umrøðu, sum eisini var rætt, men samstundis eru aðrar vanlukkur at kalla gloymdar, sigur norski aðalskrivarin í UNICEF, Kjersti Fløgstad, við Aftenposten.

Sum dømi nevnir hon, at tørvur er á 2,5 milliardum krónum til Darfur í Sudan. Har hava 3,4 milliónir fólk mist lívsgrundarlagið. Av teimum eru 1,4 millión børn, og 500.000 eru yngri enn fimm ár. Fáa tey ikki hjálp, koma tey ikki undan, sigur Kjersti Fløgstad.

## Sleppa rættarmáli

Myndugleikarnir í Turkalandi hava slept ætlanini at draga rithøvundan Orham Pamuk fyri rættin.

Ætlanin var at stevna Orham Pamuk, tí hann í einari samrøðu í fjør segði, at turkar høvdu beint fyri einari millión armenum og 30.000 kurdum, men at eingin tordi at taka tað upp á tunguna. Turkisku myndugleikarnir halda uppá, at talan var ikki um fólkamorð, og at nógvir turkar eisini lótu lív tá.

Samrøðan fekk øði í myndugleikarnar í Ankara, og teir hóttu við at draga Orham Pamuk í rættin, men eftir stórt trýst frá ES hava teir gjørt av at sleppa málinum. ES gjørdi vart við, at eitt tílíkt rættarmál hevði ikki gagnað turkisku roydnunum at sleppa upp í evropeiska samveldið, tí tað hevði verið brot á tali- og skrivifrælsið.

## Vilja ikki hava brúgv

Fleiri túsund fólk á italsku oynni Sisilia gingu sunnudagin mótmælisgongu ímóti ætlanini hjá stjórnini í Rom at byggja eina brúgv ímillum meginlandið og oynna.

Tað vóru umhvørvisverndarfelagsskapir og ymiskir politiskir felagsskapir, sum skipaðu fyri mótmælisgonguni. Tey vilja vera við, at ein brúgv innan av meginlandinum fer at oyðileggja umhvørvið á oynni, serliga fuglalívið. Harafturat vístu tey á, at økið er jarðskjálvtaøki, og at tað tí ikki er egnað til eina brúgv, sum verður ein av teimum lomgstu av sínum slagi í heiminum.

Tey, sum hava gjørt ætlanina, viðganga, at brúgvin fer at órógva náttúruna á oynni, men at tey hava lagt dent á at avmarka avleiðingarnar.

Ein nevnd, sum stjórnin setti at kanna fyrimunir og vansar við einari brúgv, kom til ta niðurstøðu, at tann tiltikna mafian kann fara at gera sær dælt av verkætlanini, sum er mett at kosta einar 30 milliardir krónur. Nevndin segði, at tá talan er um so nógvar pengar, fer mafian at royna at fáa sín part burturav.

## Bin Laden hevur talifrælsi



*Osama bin Laden*

Um nakrar mánaðir kemur ein bók út í Noregi við 20 røðum, sum yvirgangsleiðarin Osama bin Laden hevur hildið á arabiskum og enskum.

Tað hevur vakt ans, at eitt norskt forlag er sinnað at geva bókina út, og at stovnurin Fritt Ord hevur játtað at stuðla útgávuni við 40.000 norskum krónum. Stjórin í forlagnum, Frode Saugestad, sigur við Aftenposten, at bókin gevur eina aðra mynd av Osama bin Laden, enn tey flestu hava. Eitt nú sæst í bókini, at bin Laden leggur stóran dent á familjulívið, sigur hann.

Tað er forlagið LSP, sum gevur bókina út, og har halda tey tað heldur ikki vera skeivt at lata norðmenn sleppa at lesa, hvat bin Laden hevur sagt ígjøgnum árini. Forlagið vísir harafturat á, at tali- og skrivifrælsið umfatar eisini Osama bin Laden.

## Ford í kreppu

Bilverksmiðjan Ford Motor Company hevur gjørt av at koyra 25.000 starvsfólk til hús og at lata fleiri deildir aftur. Tað verður gjørt fyri at venda teirri skeivu fíggjarligu gongdini hjá fyritøkuni, men serfrøðingar siga, at Ford fer framvegis at hava hall í rakstrinum.

Ein stórur trupulleiki hjá Ford er, at verksmiðjan hevur mist ein stóran part av marknaðinum. Fyri tíggju árum síðani komu 26,4 prosent av øllum bilum frá Ford, men í dag er hetta talið bara 17,4 prosent. Tey serkønu siga, at bilarnir hjá Ford eru munandi betri nú enn í nítiárunum, men at verksmiðjan kortini ikki hevur megnað at gera teir bilarnar, sum fólk vilja hava.

Tað er kortini ikki bara Ford, sum hevur mist fótafestið á marknaðinum. Tað sama er galdandi fyri General Motors og Chrysler-Daimler, sum heldur ikki standa seg í kappingini við bilarnar úr Japan. Serliga Toyota hevur havt stóra framgongd í USA.